## Fjeppari snýtti Newcastle

Heldur óvanliga setti eigarin av Newcastle, Mike Ashley, felagið til sølu á heimasíðuni hjá Newcastle, og tað fekk fleiri at gera gjøldur burtur úr felagnum. Ikki minst hjá arvafíggindunum í Sunderland elvdi hetta til stuttleika, tá ein fjeppari segði seg vilja bjarga felagnum. Undir dulnevninum Rick Parkinson segði hann, at hann vildi keypa felagið fyri 784 milliónir, umframt at hann vildi nýta somu upphædd at styrkja felagið við. Í fyrsta umfari varð boðið tikið í álvara, og tað helt Richard Parker, sum maðurin veruliga æt, vera óføra stuttligt.



## Símun á beinkinum

Símun Samuelsen var ikki millum teir fyrstu ellivu, tá Keflavík í gjár spældi útidyst móti KR í bestu íslendsku fótbóltsdeildini. Símun meiddi sær fótliðin í landsdystinum móti Serbia, og enn er hann ikki 100% til reiðar at spæla. Keflavík skuldi vinna dystin, um teir skuldu halda fast í oddastríðnum, men talan gjørdist um dyggan 4-1 ósigur, soleiðis at tað ístaðin er KR, sum eltir FH og Stjarnuna, sum eru á fremstu sessunum.

# Kundu saktans havt vunnið

**– Tað kostaði, at vit ikki tordu at spæla, tá vit fingu teir heilt løttu bóltarnar, sum vit eiga at vinna, helt venjarin hjá føroyska kvinnulandsliðnum, Kristian Mikkelsen, eftir teir báðar venjingardystirnar ímóti Danmark um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Saman við Jóhan Petur á Stongum hevur Kristian Mikkelsen í tveir mánaðir arbeitt við at fáa kvinnulandsliðið at leggja seg eftir einum nýggjum spælistíli, ið serliga skal fáa miðjuna at flyta seg meira, so sleppast kann undan blokkinum hjá mótstøðuliðnum.

Nýggi spælistílurin skuldi so standa sína roynd, nú Danmark sendi sítt besta kvinnulandslið hendavegin um vikuskiftið. Føroyar taptu teir báðar dystirnar, men í fyrra dystinum í Trongisvági leygardagin eydnaðist at vinna eitt sett, og tað var eisini um reppið, at tað eydnaðist í dystinum á Giljanesi í gjár.

– At vit fáa danska landsliðið hendavegin, er øgiliga væl rakt. Tær eru eitt lítið sindur meira royndar enn okkara spælarar, men tá vit spæla upp til okkara allarbesta, kunnu vit saktans vinna á teimum. Vit síggja, at munurin á okkum og hinum er minkaður nógv, segði hann.

### Eru væl fyri

Kristian Mikkelsen ásannaði, at dystarvenjingin helst var størsti munurin á liðunum, og at tað kostaði hesa ferð:

– Vit skuldu í veruleikanum havt vunnið bæði fyrsta og annað sett í seinna dystinum, tí heldur enn at tað var Danmark, ið vann á okkum, vóru tað vit, sum ikki tordu at spæla, tá vit fingu teir heilt løttu bóltarnar, sum vit eiga at vinna, segði hann.

Nú smáar tvær vikur eru til Oyggjaleikirnar á Álandi, er upp til venjararnar at fáa rættað nøkur av tingunum, so tað skal bera til at vinna gullið aftur á Oyggjaleikunum.

– Nú skulu vit bara fínpussa smálutirnar. Vit hava spælt tvey sera góð sett í hvørjum dysti og eru rættiliga væl fyri. Vit skulu nokk sláa til, tá vit koma til Oyggjaleikirnar, segði Kristian Mikkelsen, ið samstundis takkaði teimum, sum vóru og hugdu at dystunum.

– Áskoðararnir hava verið heilt ótrúligir, og at teir hildu so nógvan gang og stuðlaðu so væl, hevði sera nógv at siga fyri okkum. Tað var fantastiskt, segði hann.



*Donsku kvinnurnar vóru hvassari enn okkara, og í avgerandi løtunum var hetta munurin á liðunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Bara fyrireiking

**– Hetta hava verið tveir fínir dystir hjá okkara kvinnum ímóti danska A-landsliðnum. Hetta er fyrireiking til Oyggjaleikirnar, og tað er sum tað, vit skulu taka hesar dystirnar, segði Jákup á Stongum, sum var viðmerkjari hjá Rás 2 undir seinna dystinum ímóti Danmark á Giljanesi í gjár**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

So hvørt sum tað leið út á seinna dystin ímóti Danmark í gjár, byrjaði møðin at gera vart við seg hjá summum spælarum, ið høvdu verið inni mestsum alla tíðina, men Jáup á Stongum, sum í gjár var viðmerkjari á Rás 2, helt hetta hava sína orsøk.

– Tað, at kvinnurnar spæla tveir dystir, sum eru teirra fyrstu landsdystir í ár, ger sjálvandi, at tær, sum mest liggur á, vikna eitt sindur og verða nakað moyrar ímóti endanum. Og tað sóu vit eisini, segði hann.

– Men tær kundu tað sama vunnið okkurt settið, og eitt nú høvdu tær tríggjar settbóltar í fyrsta setti í dag. Høvdu tær vunnið teir bóltarnar, hevði tað óivað givið meira eisini til restina av dystinum, og tað vildi so verið eitt yvirraskilsi.

Sum heild helt Jákup, at føroyska kvinnulandsliðið í løtum vísti sera gott spæl og væl megnaði at leggja Danmark undir trýst, og tí helt hann, at endamálið við hesum báðum dystunum til fulnar var rokkið:

– Hetta hava verið tveir fínir dystir hjá okkara kvinnum ímóti danska A-landsliðnum, sum er tað besta, danskarar kunnu bjóða. Vit skulu eisini hava í huga, at hetta er fyrireiking til Oyggjaleikirnar, og tað er sum tað, vit skulu taka hesar dystirnar, segði hann.

# Bilsin av Føroyum

**Svenski landsliðsvenjarin hjá Danmark, Tony Westman, var bilsin av mótstøðuni, hansara kvinnur fingu frá teimum føroysku í teimum báðum venjingardystunum um vikuskiftið. – Fáa tit rætta feilirnar, er talan veruliga um eitt gott lið, segði hann**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

At teir báðir sigrarnir á Føroyum høvdu týdning fyri donsku kvinnurnar, kom týðiliga til sjóndar, tá Danmark hevði vunnið seinna dystin. Donsku spælararnir vóru ovurfegnir, og tað sama vóru venjararnir og tey, sum vóru um liðið.

Svenski landsliðsvenjarin hjá Danmark, Tony Westman, segði aftaná, at bæði hann og spælararnir høvdu fingið nógv burtur úr hesum báðum dystunum ímóti Føroyum:

– Eg eri avgjørt nøgdur, tí vit fingu tveir fínar dystir, umframt at vit spældu væl. Slíkir dystir geva altíð nakað, og vit hava fingið nógv burturúr, segði Tony Westman, sum nú kann síggja fram til ein lítlan steðg frá flogbóltinum, tí danska landsliðsárið endar nú.

– Vit hava lært nógv hesar dagarnar, so hetta hevur verið gott fyri okkum. Og vit eru fegin um, at vit kundu enda við at vinna hesar báðar dystirnar.

### Kunnu bjóða av

Undan fráferðini til Føroya hevði danska kvinnulandsliðið roknað við, at talan bleiv um tveir dystir ímóti einum liði, ið minti ikki sørt um tað grønlendska, sum danska landsliðið smurdi av herfyri, men Tony Westman ásannar, at tey fingu annað at síggja:

– Eg eri positivt bilsin av føroyska liðnum, sum hevur nógvar góðar spælarar. Har verða kanska gjørdir í so nógvir feilir júst nú, men fáa tey rætta teir, er talan veruliga um eitt gott lið, segði hann og helt fram, at Føroyar saktans kunnu bjóða hinum norðurlondum av.

– Norra, Danmark og Svøríki plaga at vera nokk so jøvn, og eftir hesar báðar dystirnar vil eg halda, at Føroyar eru stutt frá at vera á sama stigi sum hini – um tit ikki longu eru har.

# Tær verða klárar

**– Hóast tær enn ikki tykjast púra klárar, ivist eg ikki í, at tær verða tað, tá flogbóltskappingin á Oyggjaleikunum fer í gongd, sigur Margit Joensen, sum í mong ár hevur verið fastur spælari á kvinnulandsliðnum**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Margit Joensen úr Mjølnir, sum í mong ár hevur verið føst og fús á landsliðnum, har hon seinnu árini hevur spælt sum libero, fer ikki við til Oyggjaleikirnar á Álandi vegna »lukkuligar umstøður«. Men hon taldist millum áskoðararnar á Giljanesi sunnudagin og tók soleiðis samanum:

– Eg helt, at fyrsta settið hjá teimum var gott, men tað virkaði, sum tær ikki fingu tað at hanga saman hini bæði settini. Í fyrsta setti, sum annars var tað besta, byrjaðu tær at gera feilir, tá tær komu upp á 22, og í triðja setti kundi innsatsurin kanska verið betri, helt Margit eftir dystin.

Hon ásannar tó, at hetta vóru venjingardystir, og at stundir enn eru til at betra ymiskt av tí, sum kanska ikki riggaði heilt hesar báðar dystirnar ímóti Danmark.

– Tá farið verður í holt við ein nýggjan spælistíl, so skal hann sjálvandi rigga øll settini og ikki bara tað eina. Tær virka ikki, sum tær eru púra klárar enn, men eg rokni við, at tær verða tað, tá tær koma til Álands, segði Margit, sum annars helt tað vera stuttligt at fáa tveir slíkar dystir í Føroyum ímóti Danmark.

– Tað er heilt greitt bara gott fyri flogbóltin, segði hon.